## Skaddur grúskongur vann

Rafael Nadal hevði ein minni skaða, tá hann sunnudagin spældi finaludyst móti sveisiska Stanslas Wawrinka í tennis-kappingini í Stuttgart. Hetta forðaði tó ikki heimsins besta grússpælara í vinna dystin 6-4, 7-5. Nadal hevur nú vunnið 93 av seinastu 94 dystunum hjá sær á grúsi.



## Rasmussen knústi feltið

Danski Michael Rasmussen tykist halda beina kós móti sínum fyrsta sigri í Tour de France. Nú súkklað verður í fjøllunum, verður aloftast sjónligt, hvørjir súkklarar megna trýstið allan vegin til Paris, og í gjár gjørdi Kyllin, sum Michael verður róptur, bart. Á tungu ferini um Plateaue de Beille traðkaði danin saman við unga Albergo Contador frá Discovery undan restini av feltinum, og einsamallir komu teir báðir í mál við Albergo sum vinnara av spurtinum. Rasmussen er nú á odda við 2 minuttum og 23 sekundum niður til Contador, sum er nummar tvey.

# Metveitsla í Belgia

**Ikki færri enn átta føroysk met vórðu sett, tá føroyskir svimjarar tóku lut í EM-kappingini í Belgia. Flottasta avrikið var hálvfinaluplássið, sum Elspa Mørkøre svam seg til í 50 metra ryggsvimjing**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Framgongdin hjá føroyskari svimjing bara stendur við. Hetta varð enn einaferð staðfest, tá fremstu yngru svimjarar okkara í farnu viku tóku lut í EJM, sum varð hildið í Belgia.

Serstakliga gjørdu Pál Joensen, Kári J. á Høvdanum og Elspa Mørkøre vart við seg í kappingini, og Elspa gjørdi ikki mætari enn at svimja seg í hálvfinaluna í 50 metra frí. Hetta er fyrsta hálvfinalupláss, sum Føroyar nakran tíð hava fingið í kappingini. Hartil var eisini sera nær við, at Elspa kom í hálvfinaluna í 100 metra ryggsvimjing. Avrik, sum enn einaferð prógvar virðið av miðvísa arbeiðinum, sum seinastu nøgvu árini er gjørt innan føroyska svimjing.

Umframt tey trý vóru eisini Guðrun H. Jacobsen, Dánjal Martin Hofgaard og Mona Simonsen partur av føroyska landsliðnum.



*Elspa Mørkøre svam seg sum fyrsti føroyingurin nakran tíð í eina EJM-hálvfinalu*
*savnsmynd*

**Metini**

| | | |
|---|---|---|
| Pál Joensen | 400 m frí | 4.06,37 |
| Pál Joensen | 1.500 m frí | 16.11,91 |
| Kári J. á Høvdanum | 50 m rygg | 28,46 |
| Kári J. á Høvdanum | 100 m rygg | 56,21 |
| Kári J. á Høvdanum | 200 m rygg | 2.14,10 |
| Elspa Mørkøre | 200 m rygg | 2.24,41 |
| Elspa Mørkøre | 100 m rygg | 1.06,75 |
| Elspa Mørkøre | 50 m rygg | 30,78 |

# Kastaðu um kapp leygardagin



*17 ára gamli Andrias Nielsen var yngsti luttakarin í kappingini*

*Mynd: www.athletics.fo*

**FM í olympisku kastgreinunum var á kastivøllinum við Eysturskúlan í Tórshavn leygardagin**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin,fo*

Íalt tóku átta luttakarar lut í kappingini, Helvt um helvt kvinnur og menn.

Yngsti luttakarin var 17 ára gamli Andrias Nielsen úr Frælsinum, og hann vann bronsu í spjótkasti. Eisini var Finnur Hansson, sum annars er kendur frá hond-bólti, við í kappingini, og fekk eisini hann fleiri góð úrslit. Sum vant var tað tó Rógvi Højgaard, ið kastaði spjótið longst. Og tað gjørdi Heri Ziska eisini við bæði hamara og diskus.

Hjá kvinnunum vóru tað Randi Kúrberg og Ingibjørg Poulsen, sum vunnu kappingarnar.

**Úrslitin, FM í kasti:**

**Spjótkast: Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| Randi Kúrberg | Bragdið | 33,10 |
| Sólja Jóanisdóttir | Frælsi | 31,97 |
| Ingibjørg Poulsen | Bragdið | 16,62 |

**Spjótkast: Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Rógvi Højgaard | Bragdið | 50,12 |
| 2 | Finnur Hansson | Bragdið | 38,72 |
| 3 | Andrias Nielsen | Frælsi | 37,23 |
| 4 | Heri Ziska | Bragdið | 25,85 |

**Hamarkast: Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Randi Kúrberg | Bragdið | 33,23 |
| 2 | Ingibjørg Poulsen | Bragdið | 30,52 |
| 3 | Silvia Henriksdóttir | Bragdið | 26,91 |
| 4 | Sólja Jóanisdóttir | Frælsi | 19,13 |

**Hamarkast: Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Heri Ziska | Bragdið | 43,23 |
| 2 | Finnur Hansson | Bragdið | 24,73 |
| 3 | Rógvi Højgaard | Bragdið | 20,74 |
| 4 | Andrias Nielsen | Frælsi | 16,81 |

**Diskuskast: Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Ingibjørg Poulsen | Bragdið | 24,54 |
| 2 | Silvia Henriksdóttir | Bragdið | 21,84 |
| 3 | Randi Kúrberg | Bragdið | 20,11 |
| 4 | Sólja Jóanisdóttir | Frælsi | 18,85 |

**Diskuskast: Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Heri Ziska | Bragdið | 40,89 |
| 2 | Rógvi Højgaard | Bragdið | 26,18 |
| 2 | Finnur Hansson | Bragdið | 23,43 |
| 4 | Andrias Nielsen | Frælsi | 17,04 |

**Kúlustoyt: Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Ingibjørg Poulsen | Bragdið | 8,86 |
| 2 | Randi Kúrberg | Bragdið | 8,21 |
| 3 | Sólja Jóanisdóttir | Frælsi | 7,61 |
| 4 | Silvia Henriksdóttir | Bragdið | 6,61 |

**Kúlustoyt: Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Heri Ziska | Bragdið | 10,97 |
| 2 | Finnur Hansson | Bragdið | 8,95 |
| 3 | Rógvi Højgaard | Bragdið | 8,93 |
| 4 | Andrias Nielsen | Frælsi | 7,00 m |